# Savna inn gamlar skipsjournalir

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Á skjalasavninum liggja bert nakrar fáar skipsjournalir og mynstringarprotokollir frá gomlum føroyskum fiskiskipum. Tí hava Føroya Fiskimannafelag og Fø.roya Skipara og Navigatørfelag tikið stig til at savna skipsjournalir, sum liggja goymdar kring landið og fáa tær á rætta plássið á Skjalasavninum, soleiðis at fjøldin kann fáa gleði av teimum.

– Vit vita, at nógvar skipsjournalir liggja kring landið til onga verðsins nyttu og hesum kunnu fólk, sum hava áhuga fyri søguni og sum kanna forfedrarnar okkara fáa stóra gleði av, sigur Petur Andrew Petersen, emeritus. Petur hjá Hoyðgarðs-Pól í Fuglafirði. Hann hevur saman við øðrum fingið Fiskimannafelagið og Skipara og Navigatørfelagið at standa fyri innsavningini og at standa fyri kostnaðinum av hesi.

Nógvar skipsjournalir liggja goymdar uppi á ovastalofti kring landið og Petur greiðir frá, at onkur hevur enntá funnið slíkar journalir á ruskplássum.

– Hetta er í seinastu løtu, at vit fara undir hetta innsavningararbeiði. Fyri tey, sum liggja inni við slíkum dagbókum nýtast tær ongan týdning av hava, men tær eru gull verdar fyri fólk, sum hava áhuga fyri søguni. Og er tað soleiðis, at onkur ikki vil av við orginalin, so er tað nóg mikið fyri okkum at fáa eitt avrit av bókini. Teknikkurin er so góður í dag, at upprunabókin er ikki tað týdningarmiklasta, sigur Petur Andrew Petersen.

– Vit vilja gera eina landsinnsavning av skipsjournalum og mynstringarprotokollum frá tí skipstíðin í Føroyum byrjaði og fram til 1950 og at handa Føroya Landskjalasavni hetta tilfarið at varðveita. Vit vóna, at vit vera lidnir við hesa innsavningina í hesum árinum, sigur Petur Andrew Petersen.

– Best hevði verið, um vit eisini fingu eina bandaða, munnliga frásøgn um teir persónar, sum hava ført hesar skipsjournalir, so umrødda band eisini kann vera lagt saman við hesum tilfari, tá ið tað verður latið landsskjalasavninum, sigur hann.

– Vanliga var eisini ein lestrabók til skipini. Um onkur hevur tílíkar lestrabøkur, vilja vit somuleiðis fegnir hava eitt ljóstak av tittulblaði og teim fyrstu síðunum í bókini og eina stutta frágreiðing um søguna hjá bókini. Um so er, at onkur vil lata okkum eina tílíka lestrabók, so taka vit fegnir í móti henni, og vilja vit somuleiðis geva Føroya Landsbókasavni hana í varðveitslu, sigur Petur Andrew Petersen

Petur sigur, at liggja fólk inni við áðurnevnda tilfarið, so ber til at ringja til hesi nummør. Føroya Fiskimannafelag tel. 311569. Føroya Skipara- og Navigatørfelag tel. 316973, Petur Andrew Petersen tel. 314581 ella 004532548441 og Føroya Landskjalasavn tel. 316677.



*Her eru skipsjournalirnar, sum Føroya Landskjalasavn hevur í varðveislu avmyndaðar á middegi hósdagin. Tær eru ikki nógvar, men nógvar aðrar liggja og fúna kring landið.*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Grindafundur í Eysturoy

GRIND
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Runavík, Sosialurin:** Komandi mánakvøld verður grindafundur í Runavík. Fundurin verður hildin í skúlanum í Runavík, har framhaldsdeildin heldur til og hann verður klokkan 19:30.

Á fundinum fer Jústinus Olsen, djóralækni at greiða frá drápsháttum. Fólk frá landsverkfrøðinginum fer at greiða frá botnviðurskiftinum á grindavágunum í Eysturoy. Eisini koma fólk frá Náttúrugripasavninum at greiða frá hvussu hvalurin livir og hvørjar trupulleikar hann hevur at dragast við í gerandisdegnum. Frá Náttúrugripasavninum vera Dorethe Bloch, Bjarni Mikkelsen og Eyðfinn Steffansson.

Stigtakararnir ætla eisini at práta eitt sindur um hugburð innan grindadráp. Eitt nú, at ójavnt er hvussu nógv teir ymisku partarnir av Føroyum fáa av grind og tí er tað harmiligt, at teir sum eru grammir eftir grind koyra góða grind burtur fyri at fáa pláss aftur í lakaíløtunum. Grind kann halda sær í nógv ár, verður hon rætt fingin til høldar.

## Inuit-játtan verður tann sama

POLITIKKUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í mikudagssosialinum skrivaðu vit, at danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen hevur boðað frá, at játtanin til ICC Inuit Circular Conference skal minka munandi. Samstundis skrivaðu vit, at Jóannes Eidesgaard og Lars Emil Johansen vóru samdir um á fundi í javnaðarflokkinum, sum Lars Emil Johansen vitjaði, tá hann var í Føroyum, at týdningurin av hesum felagsskapi var stórur og at teir báðir vildu virka fyri, at hesin felagsskapur fekk enn betri sømdir.

Danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen hevur vent sær til ríkisumboðsmannin, Birgitte Kleist og boða frá, at tað hevur ongantíð verið ætlanin hjá stjórnini at minka um játtanina til ICC.

## Dagstovnur nýggja stovu

**Tann 15. februar varð tann síðsta stovan liðug á Dagstovninum í Øksnagerði í Havn. Í dag 15. mars verður mótttøka klokkan 16.00, har øll eru vælkomin**

DAGSTOVNUR
*Elsa Johannesen, praktikantur*

Móttøkan byrjar við at borgarstjórin bjóðar vælkomin. Terji fer at syngja um kettlingarnar, og síðani fara formaðurin í mentamálanevndini og arkitekturin fara at flyta fram røðu. Eisini verður høvi at síggja stovnin, og njóta eitthvørt leskandi.

Dagstovnurin í Øksnagerði lat upp 3. september 2001, og tilsamans eru 65 børn í fýra stovum. Tvær stovur eru vanligar stovur, ein stova er ein serstova fyri børnum við serligum tørvi, meðan tann síðsta er ein smábarnastova, sum er nakað heilt nýtt. Har eru 18 børn, øll tvey ára gomul, og hetta er komið ístaðin fyri eina vøggustovu.

Stovan, ið varð liðug 15. februar, er sera stór og rúmlig. Gólvið er blátt, eins og veggirnir. Tað líkist eitt sindur einum ítróttarhøli av tí at har er høgt uppundir loftið, og so eru ikki so nógv ting inni. Rundar lampur hanga niður úr loftinum, meðan træpelar eru upp í loftið, sum eisini eru málaðir bláir við reyðum og appelsingulum ringum. Nýggi dagstovnurin er í heila tikið vakur og verdur at hyggja eftir, og tilsamans starvast 18 fólk har.



*Dagstovnurin í Øksnagerð hevur í morgin móttøku í sambandi við, at teir hava fingið nýggja stovu*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Keyptu amfetamin frá rokkarum

**Fyrrapartin hósdagin vóru tveir 25 ára gamlir menn fyri í Føroya Rætti, ákærdir fyri at hava smuglað og selt stórar mongdir av rúsevni. Báðir høvdu nógvar ákærur at svara fyri, tí tær vóru einar tjúgu í tali fyri hvønn. Teir játtaðu seg sekar, men vildu tó teir ikki kennast við tær nøgdir, ið ákæruvaldið legði fyri rættin. Á rættarfundinum viðgingur menninir, at teir m.a. høvdu fingið 187 gramm av amfetamini og 30 ecstacy pillarar frá Hell´s Angels rokkarum í Hanstholm, sum teir síðani smugladu til Føroyar**



*Løgreglan førir her tann eina mannin, ið er ákærdur, inn í rættarhølið. Teir báðir viðgingu seg partvís sekar í langa ákæruritinum*
*Mynd: Jens Kr. Van*

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Stóra narkomálið er um at koma í hæddina. Hósdagin var enn eitt rættarmál í Føroya Rætti. Tveir 25 ára gamlir menn vóru á ákærubeinkinum, ein dani og ein føroyingur. Teirra mál verða viðgjørd saman, tí teir báðir hava samstarvað.

Blaðið fór til prentingar, áðrenn dómarin hevði gjørt ein úrskurð. Meira verður tí at frætta frá málinum í blaðnum í morgin.

Verjin vildi fyrst hava, at rættarmálið fór fram fyri afturlatnum hurðum, og at rætturin setti navnaforboð og referatforboð. Orsøkin var, at menninir framhaldandi ætlaðu sær at búgva í Føroyum eftir at hava sitið dómin og fyri at verja tey avvarðandi.

Hesum vísti ákærin aftur, tí lógarbrotini vóru somikið álvarsom, at almenningurin og samfelagið sum heild høvdu áhuga og rætt til at vita, hvat gekk fyri seg í rættinum.

Dómarin tók undir við ákæranum, og rættarfundurin fór fram fyri opnum hurðum.

### Keyptu frá rokkarum

Eftir tað las ákærin alt ákæruritið upp. Og tað var langt. Báðir høvdu eini tjúgu mál at svara til í part. Rúsevni sum hassj, kokain, amfetamin og ecstacy vórðu nevnd í ritinum, sum teir skulu hava selt og smuglað.

Tann eini maðurin var eisini ákærdur eftir revsilógini fyri at hava sagt ósatt fyri løgregluni undir avhoyringum.

Fyrsta ákæran var, at menninir í felag høvdu smuglað 232 gramm av amfetamini til Føroyar við Norrønu í august í fjør. Danin greiddi frá, at hann skipaði fyri smuglingini, og at hann setti seg í samband við seljarar í Hanstholm. Hesir vóru Hell´s Angels rokkarar í bólkinum Red and White, sum er ein partur av Hell´s Angels.

Ákærin bað teir báðar peika á mannin, ið amfetaminið varð keypt frá, á eini mynd. Føroyingurin vísti rættinum, hvørjum hann hevði keypt frá. Hann viðgekk eisini, at hann hevði fingið 30 ecstacy pillarar frá rokkaranum í Hanstholm.

Teir ákærdu vildu ikki kennast við tey 232 grammini, men hildu, at talan var um eina nøgd, sum var umleið 187 gramm. Amfetaminið skuldi nýtast til at gjalda skuld, ið føroyingurin hevði til fleiri persónar, sum vórðu navngivnir í rættinum. Restin av amfetamininum varð goymt í viðalundini aftanfyri hvíldarheimið Naina í Gundadali.

Føroyingurin arbeiddi um hetta mundið umborð á Norrøuni, og tí hevði hann ongar trupulleikar at sleppa í land við rúsevnunum.

## Valið verður 30. apríl

LØGTINGSVAL
*Jan Müller*

Mánadagin fer Anfinn Kallsberg, løgmaður, at skriva út val til løgtingið.

Hann sigur við Sosialin, at hann tá fer at skriva valið út til at vera týsdagin 30. apríl.

Sostatt verða gitingarnar um at halda valið fyrr avsannaðar.

## Avbyrging longd

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur longdi mikudagin varðhaldsfongslingina hjá einum dana, ið er skuldsettur í narkomálinum. Varðhaldsfongslingin er longd við fjúrtan døgum, og hann skal sita avbyrgdur hesa tíðina.

Maðurin kærdi avgerðina um avbyrging til Landsrættin, men hann tók við dóminum um longda varðhaldsfongsling.

Maðurin varð tikin 16. januar í ár í Keypmannahavn, har hann hevur fastan bústað. Hann varð síðani fluttur til Føroya, tí løgreglan metir, at hann hevur samband við hinar í narkomálinum.


rarp kat a r otor

Vit hava hópin av frásorteraðum bilum, ið verða seldir fyri væl niðurtrampaðar prísir.



Ein rúgva av brúktum bilum verða eisini seldir bíliga

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35